Føroya Pedagogfelag 01.10.2005

Semja millum:

**Føroya Pedagogfelag**

og

**Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, KAF**

**og Fíggjarmálaráðið**

**viðvíkjandi sáttmálum:**

I. **fyri pedagogar**

II. **fyri hjálparfólk, og**

III. **avtalu um tænastumannasettar pedagogar**

Galdandi fyri tíðarskeiðið 1.oktober 2005 – 1.oktober 2007

Til sáttmálarnar millum **Føroya Pedagogfelag** og **Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, KAF og Fíggjarmálaráðið**, dagfestir 25. oktober 2003, og sum vóru sagdir upp til 1. oktober 2005, verða gjørdar niðanfyri standandi broytingar:

**Sáttmáli I § 1 Sáttmálaøki**

Galdandi frá 1. januar 2007

Nýggj orðing av grein:„Hesin sáttmáli er fyri pedagogar ið starvast hjá kommunum, hjá landinum og á sjálvsognarstovnum (heilt ella partvís fíggjaðir við almennari játtan)".

**Sáttmáli II, § 7 Eftirløn**:

Orðini "uttan slit" verða strikað.

**Sáttmáli II nýggj § 22 Farloyvi**

Hjálparfólk kann fáa farloyvi, tá ið tað ikki nervar arbeiðið á stovninum. Farloyvi kann játtast upp til 5 ár. Setanarstaðið hevur ábyrgd av at hava starv leyst til viðkomandi, tá ið farloyvi er úti.

**Sáttmáli II, § 3, stk. 4**

Galdandi frá 1. november 2006.

Í øðrum broti verður orðið “kann” broytt til “skal”.

**Sáttmáli I, § 3 Løn**

Pedagogar, sum í landsins tænastu eru í starvi sum leiðarar, verða løntir soleiðis:

| | |
|---|---|
| Leiðari á smáum bústovnum | 24, 26, 28, 29 |
| Leiðari á stórum bústovnum | 25, 27, 29, 30 |
| Leiðari á stórstu bústovnum | 27, 29, 31, 33 |

Leiðarar, sum í 2 ár hava staðið á ávíkavist 28, 29, 31 stigið, flyta í nýggja hægsta stigið.

Pedagogar á serstovnum/bústovnum verða løntir smb. stigunum 11 – 19.

Pedagogar, sum í 2 ár hava eru løntir smb. stig 18, flyta í stig 19.

**Sáttmáli I, § 3 Løn**

A. – Dagstovnaøkið

Assistentar verða løntir á lønarstigunum 11 - 17

Viðm. Hetta merkir, at byrjanarlønin verður smb. stig 11 í staðin fyri stig 10, og at endalønin verður smb. stig 17 í staðin fyri stig 16. Fyri teir pedagogar sum í dag verða løntir smb. Stigunum 11 til 16 verður ongin broyting við undantaki av teimum sum hava verið 2 ár í 16 stigi, - hesi verða frá 1. januar 2007 lønt smb. Stig 17.

Galdandi frá 1. januar 2007.

**Sáttmáli I, § 6 Eftirløn**

Nýtt stk. 2 a:

Fyri pedagogar **á landsins stovnum** verður eftirlønargjaldið

- frá 1. januar 2007 14,0 %.

**Sáttmáli I, § 7 Felagslívstrygging**

**Sáttmáli II, § 8 Felagslívstrygging**

**Avtalu III, § 14 Felagslívstrygging**

"125 kr." verður broytt til "eina upphædd, ið pedagogfelagið ásetur".

**Sáttmáli I, § 6 Eftirløn**

**Sáttmáli II, § 7 Eftirløn**

Nýtt stk.

"Parttíðarsett ið arbeiða yvir ásettan norm, hava rætt til eftirløn av meirarbeiðstímum, tó í mesta lagi svarandi til lønina til fullan mánaðarnorm."

**Sáttmáli I, § 11 Samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð**

**Sáttmáli II, § 5 Samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð**

Samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð hækkar við karminum.

**Sáttmáli I, § 3 Løn**

**Sáttmáli II, § 3 Løn**

**Avtalu III, § 3 Løn**

Lønin broytist soleiðis:

- frá 1. oktober 2005 hækkar lønin 0,9 %.
- frá 1. oktober 2006 hækkar lønin 1,7 %.

**Sáttmáli I, § 3 Løn**

A.- Dagstovnaøkið (verður broytt til)

Leiðarar:

| | |
|---|---|
| 0- 79 stig á lønarstiganum | 19, 21, 23, 25 |
| 80- 119 stig á lønarstiganum | 21, 23, 25, 27 |
| 120- 174 stig á lønarstiganum | 23, 25, 27, 29 |

175- 290 stig á lønarstiganum 25, 27, 29, 31

B. Dagrøktarskipanin (Verður broytt til)

Dagrøktarleiðarar við útbúgving:

0-119 stig á lønarstiganum 17, 19, 21

120-174 stig á lønarstiganum 18, 20, 22

175- stig á lønarstiganum 19, 21, 23

Broytingin er galdandi frá 1. januar 2007.

**Sáttmáli II, § 3 Løn**

§ 3. Lønir, stk. 4. (Hjálparfólk við pedagogiskari ábyrgd)

... verða lønt á lønarstiganum 6 – 9.

Broytingin er galdandi frá 1. januar 2007.

**Sáttmáli I, § 30 Gildi sáttmálans**

**Sáttmáli II, § 22 Gildi sáttmálans**

**Avtalu III, § 17 Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. oktober 2005, og kunnu báðir partar siga hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2007. Í samband við uppsøgn av sáttmálanum, kann annar parturin krevja, at samráðingar byrja innan ein mánaða eftir, at krøv eru send mótpartinum. Tó kann parturin í fyrsta lagi krevja, at samráðingar byrja um endurnýggjan av sáttmálanum 3 mánaðir áðrenn hann fer úr gildi.

**Viðvíkjandi tænastumannasettum pedagogum.**

Broytingin av § 1 í sáttmálanum merkir, at framyvir hevur arbeiðsgevarin valið millum tvinnar setanarhættir á serforsorgarstovnum landsins, tænastumannasetan ella sáttmálasetan. Í tí sambandi skal Fíggjarmálaráðið gera greitt, at ongar ætlanir eru at skerja rættindini hjá verandi tænastumonnunum. Teir hava framvegis møguleika at søkja størv á einum øðrum serforsorgarstovni og har varðveita sína tænastumannasetan. Hendan møguleika hava teir eisini á møguligum nýggjum serforsorgarstovnum og kanska eisini á øðrum stovnum landsins.

Í ivamálum tekur Almanna- og Heilsumálaráðið avgerð um tílíkar umsóknir.

**Tórshavn 8. november 2006**

***Vegna*** ***Vegna***

***Føroya Pedagogfelag*** ***Kommunala***

***Arbeiðsgevarafelag Føroya***

……………………………………………… ………………………………………………

Jarvin Feilberg Hansen Heðin Mortensen

……………………………………………… ………………………………………………

Rógvi Fossádal Rósa Samuelsen

……………………………………………… **Vegna**

Anja Egholm **Fíggjarmálaráðið**

………………………………………………

Jógvan Philbrow

………………………………………………………

Bárður Nielsen


Fíggjarmálaráðið - Kvíggjartún 1 - Postboks 2039 - FO-165 Argir - Tel. 35 20 20 - Fax: 35 20 25

fmr@fmr.fo